# Gulur veruleiki

UMMÆLI

*Kinna Poulsen*

Gløðandi, cadmiumgula myndin hjá John Kørner hitar betri enn nakar hitaovnur, nú ein hvirla aftrat minnir á, at heldur ikki summarið er endaleyst. Sama er galdandi fyri áhugaverdu, (nokk so) nógv umrøddu summarframsýningina í Norðurlandahúsinum, sum lat aftur í síðstu viku, men sum ikki er farin heilt í søguna allíkavæl. Í sambandi við 25 ára hátíðarhaldið hjá Norðurlandahúsinum, verður hon nevniliga framsýnd í ymiskum norðurlondum komandi ár. Listafólkini, sum eru við á hesi framsýning eru rættiliga ymisk, hvat viðvíkur listarligum úttrykki og royndum og framsýningin er sostatt sera ymislig ikki minst í mun til hvussu tað rættiliga breiða framsýningaruppleggið undir heitinum [natúrligvís] verður fatað. Danski listamaðurin John Kørner nýtti framsýningaruppleggið sum høvi til at koma við einari viðmerking til kjakið, ið tók seg upp í sambandi við viðgerðina av grein 266 b. Í hansara hálvabstrakta, flótandi akrylmálningi hómast tvær at síggja til mannligar verur dansa saman á eini blágrønari bakgrund, ið bæði gevur hugasamband til leiktjaldið á einum sjónleikarapalli og til eitt landslag. Huglagið er lætt, eins og boðskapurin kundi líkst einum argandi mótmæli móti tí ónátúrliga, avnoktandi hugburðinum, summi her heima hava mótvegis homoseksualiteti.



*Flagtakshús á gulari bakgrund*



*Poetisk, ljómandi lýsing av Tindhólmi*



*Hendan kenna vit aftur á umhvarvinum*



*Postkortmyndir í gulum*

## London - Tórshavn

John Kørner (f.1967) kom á triðjaplássi, nú Carnegie Art Award vóru tillutaðar, hóast mong og helst eisini hann sjálvur høvdu væntað, at hann fór at fáa fyrstu heiðurslønina. Í staðin fekk tann væl eldri svenski listamaðurin Torsten Andersson (f.1926) 1. virðisløn fyri sítt konseptuella og sera persónliga málarí, sum m.a. fevnir um avmyndan av standmyndum. Kørner hevur annars verið fyri nógvum viðburði seinastu árini, bæði heima í Danmark, men eisini í altjóða høpi, har hann t.d. er umboðaður á høgt metta gallarínum Victoria Miro í London. Skipasmiðjan í Havn er langt frá London, men tað var harúti í Listahøllini á framsýning hjá Føroya Grafiska Verkstaði, at undirritaða sá og gjørdist fullkomiliga skotin í nøkrum gulum steinprentum hjá John Kørner. Myndirnar eru allar figurativar við kliché- ella postkortkendum, føroyskum myndevnum sum t.d. av einum pari í tjóðbúna, útsýni yvir Tindhólmi, føroyskum húsum við flagtaki osfr.

## Myndlist er samskifti

Gulu steinprentini vórðu gjørd á Grafiska Verkstaðnum í Gundadali í Havn og tað var eisini har, eg hitti listamannin til eitt stutt viðtal í summar. John Kørner hevur seinni árini arbeitt við ymiskum tøkni frá málarí til installatión, veggmálarí osfr. og sigur sín fremsta áhuga liggja í sjálvum dialoginum við áskoðaran, hvørs uppliving er við til at avgera listaverki: “Eg eri sera upptikin av áskoðaranum, hvussu hann fatar og skrásetir mítt úttrykk. Fyri meg er myndlist samskifti og tí er tað umráðandi, at eg royni at seta meg inn í hvussu tað, eg skapi verður uppfatað av móttakaranum”. Í áðurnevndu postkortkendu myndum tykist listamaðurin spæla við tær konnotatiónir, sum eru í einum traditionellum myndevni. Hóast minni mát, er hugskotið í grundini ikki ólíkt hugskotinum, sum bulgarski listamaðurin Christo hevði, tá hann í 1995 pakkaði ríkisdagin í Berlin inn í hvítt klæði. Kørner setur í sínum lítla steinprenti Tinganes á gula bakgrund og hetta gevur myndini ein stuttligan og óhátíðarligan dám, ið spælir saman við fatanini, áskoðarin longu hevur av tí, sum avmyndað er.

## Patos

Saman við tí einfaldaða, flata úttrykkinum og teimum ljósareyðu blettunum og slettinum, brýtur guli liturin alla naturalistiska illusión í myndunum. Men úttrykkið í gulu myndunum er fleirtýðugt. Aftrat øllum tí hugsaða, er okkurt sansandi og ekspressivt, ið ávirkar áskoðaran kensluliga. Saman við tí greinandi speiseminum, sveimar ein eftir øllum at døma ósamsvarandi patos yvir hesum myndum, sum eisini eru dekorativar við eini lættari og artistiskari striku. Hetta sæst t.d. á lýsingini av einum gongumanni, ið sæst aftanífrá við listamannahári og -skeggi í dekorativum andarisi. Eg spyrji listamannin hvørt tað gula skal fatast konseptuelt, ironiskt, men skilji á andlitsbragdinum, at eg nú havi spurt fýrkantað og býtt. Teinkipausa og so hulisligt svar: “Eg brúki gult í staðin fyri t.d. hvítt. Gult umboðar ein annan veruleika enn hvítt...”. Listaummælarin nikkar, tó at hon ikki heilt skilir, men nú er tíðin farin, eisini hjá teimum við gulum bandi, tí listamaðurin skal túr við Norðlýsinum. Í staðin vendi eg aftur til gulu myndirnar eftir svari.